

**Óli Jacobsen**
olijacobsen@post.olivant.fo

Ejler Djurhuus:

# Sýslumaður í Klaksvík aftaná læknastríðið

**Ejler kom at royna seg um sýslumaður ymsa staðni. Eisini í Klaksvík eftir læknastríðið. Her var hann væl móttikin, hóast pápin hevði boðsent »hundaskipinum« og »krákuskipinum.«**

Eg bygdi í 1951, tá eg giftist, men flutti í 1962 inn í sýslumanshúsini. Tá eg fór frá í 1989, flutti eg inn higar við Rangá.

Kona mín, Sigga, var dóttir Knút Nygaard, lækna. Hann var ættaður av Eiði og var beiggi Thomas Nygaard, í dag framvegis kendur frá skipinum av sama navni. Ein triði beiggi var Sofus, sum bleiv verandi á Eiði.

Í 1954 kom eisini læknastríðið í Klaksvík. Hetta førdi til flyting av sýslumonnum millum sýslurnar. Ein av hesum flytingum var, at Gunnar Dahl Olsen, sum var sýslumaður í Vestmanna, skuldi fara til Klaksvíkar. Hann var kendur sum semingsmaður, hann var jú eisini nevndur Gunnar blíði. Tað var ein slíkan, sum brúk var fyri í Klaksvík tá. Tað riggaði eisini sera væl.

Gunnar setti sum treyt fyri at fara til Klaksvíkar, at eg skuldi avloysa hann í Vestmanna. Tað bleiv eisini orðnað soleiðis. Hákun Hansen, sum hevði verið í Klaksvík, kom so higar til Tvøroyrar. Hetta skuldi vera fyri tvey ár. Men tá henda tíðin var liðin fekk eg boð um, at eg mátti halda fram eina tíð.

Eg hevði leigað hús í Vestmanna og fekk eisini konuna og børnini norður. Vit fingu tvey børn afturat teimum trimum vit áttu, meðan vit vóru har.

Á vári 1959 doyði kona Gunnar Dahl Olsen. Í samband við jarðarferðina segði eg við ríkisumboðsmannin Elkær Hansen, at nú vóru trý ár farin, síðan eg varð settur sýslumaður í Vestmanna, og tað skuldu bara vera tvey ár. Tá segði hann, at hetta hevði hann einki við at gera. Økið var farið yvir til fútan, sum tá var Feilberg Jørgensen.

> **Komandi partur**
> Mamma Kristian Djurhuus, Elin Larsen, úr Porkeri var eitt konubrot. Hon hjálpti eisini jarðarmóðrini í Havn. Í komandi parti greiðir Ejler frá flogvanlukkuni á Tvøroyri í 1954

Eg fór so til hús, og tá situr fútin har saman við pápa. So fortelji eg hetta fyri fútanum, og hann svaraði: »Sagde han virkelig det?«, sum um hann ikki visti av tí.

Trupulleikin var tann, at vit vóru uppsøgd úr húsunum, har vit búðu. Tann, sum vit leigaðu húsini frá, skuldi nýta tey aftur. So 1. juni máttu vit flyta út og høvdu onga staðni at fara. Alt innbúgv v.m. máttu koyrast inn í eitt pakkhús.

Eg ringdi so til fútan og segði, at nú vóru vit húsvill her í Vestmanna. Eg visti ikki, hvønn mann kundi takka fyri hetta, men hetta var ikki haldbart.

Tað var lovað mær at koma aftur til Tvøroyri enntá av H.C. Hansen forsætisráðharra, sum var í Føroyum í 1956. Hann hevði tá spurt meg, hvat mær dámdi at fara til Vestmanna. Tá helt eg, at tað kundi vera áhugavert at royna okkurt annað. Eg segði honum, at tað var lovað mær at sleppa suður aftur til Tvøroyrar, tá tey tvey árini vóru farin. »Det skal De selvfølgelig«, svaraði hann aftur.

Men tað var einki brævaskifti um hetta. Hetta vóru alt munnligar avtalur. Eg segði so við fútan, at tað var lovað mær, at um tvey ár skuldi eg sleppa suður aftur. »Det kan De godt,« svarar hann. Men so skuldi tað vera sum fulltrúi hjá tí setta sýslumanninum á Tvøroyri.

## Sýslumaður í Klaksvík

Men hesum hevði eg ikki áhuga fyri. Eg kom so til Klaksvíkar 1. juni 1959 og var har til 1. oktober 1962. Tað riggaði fínt, eingin trupulleiki av nøkrum slag. Eg hoyrdi ikki eitt orð fyri, at eg var sonur tann løgmannin, sum hevði ábyrgdina av teimum politiskipum Parkeston og Rolf Krake , sum danir sendu til Klaksvíkar nøkur fá ár frammanundan.

Tað var ofta prátað um mangt og hvat við teir, sum komu á skrivstovuna. Tað vóru eisini fleiri av teimum, sum høvdu verið víðgongdir undir læknastríðnum, men sum nú søgdu, at teir skiltu snøgt sagt ikki, hvat ið var gingið av teimum. Eg hevði góð viðurskifti við allar klaksvíkingar.

Tað var tó ein hending við Poul Kajer. Hann var beiggi Johan Húshamar. Báðir vóru roknaðir fyri at vera »originalar« í Klaksvík. Klaksvíkingar duga væl at seta eyknevni á fólk. Poul fekk hetta eyknevni, tí hann gekk so nógv niðri á kajuni!

Tað var ein grind í Klaksvík, og nú stendur Poul niðri við kioskina. Honum dámdi væl at brúka seg, og hann tosaði ofta so hart. Sýsluskrivstovan var beint við, og hurðin var gloppað. Eg síggi, at hann peikar niðaneftir og sigur hart, at »um tað skal vera, skal eg brúka knív!« Tá skundaði eg mær út og stóð fyri honum í trappuni. So sigi eg: »Hvat var tað, sum eg hoyrdi. Hvat skal tú brúka knív til?«

»Noy, noy, tað var ikki soleiðis moynt!«

»Kom tú líka við mær inn á kontórið og so einki við at brúka seg meira«.

So eg fekk hann at undirskriva eina erklering um, at tað, sum hann hevði sagt niðri í kajuni, skuldi ikki takast fyri fult, og at hann tók orðini aftur. Eg gav honum tvær teknistiftir og gav honum boð um at festa hesa erklering á uppslagstalvuna á kioskini. Tað gjørdust heldur ikki fleiri trupulleikar av honum.

Men aftaná hesa tíðina í Klaksvík kom eg so aftur til Tvøroyar og kom at hava restina av mínum sýslumansvirki her.



*Í myndasavninum hjá Høgna er eisini henda ungdómsmyndin av Daniel J. Danielsen, Dollan, sum kom at skapa søgu í Congo nøkur ár seinni, sum greitt er frá í bókini um hann. Sambandið teirra millum var, at C.C. Danielsen, mammubeiggi Dollan, var giftur við Onnu Sofíu, mostir Kristian Djurhuus*



*Sýslumanshúsið á Tvøroyri*